
*Best sum fólk vóru við at fara í heilt sjálvsving í tunnilsrúsinum, beyðst høvi at hoyra ikki sørt tankavekjandi tunnilshugleiðingina hjá Tobba í Leikalund leygarkvøldið*

seg, skal miðstaðarsentrifugan ikki súgva alt fólkið til sín. Tað er har sindrið av tilboðum eru - sum er. Bæði Klaksvíkin og Eysturoyggin mega gera eitt átak, útfrá egnum premissum sjálvandi, fyri at halda stand. Fyri at ferðslan ikki skal gerast einvegis – suðureftir.

Tað tykist í fyrstu atløgu, sum klaksvíkingar hava tikið tarvin við hornunum. Hava í løtuni mest progressiva fíggjarstovnin í landinum, ein sparikassastjóra, sum hevur skilt, at man ikki kemur sovandi til nýggju støðuna, og ein umboðsnevndarformann, sum er í takholt við at leggja allan sandin undir seg, nú norðoyingar gerast ein samanrunnin partur av meginFøroyum. Dubbast má á handilssíðuni, á mentanarsíðuni, á tilboðssíðuni í aðrar mátar, hugsi um dansistøð, matstovur, pubbir etc. Á vinnusíðuni er Klaksvíkin somikið magnfull, at hon hevur nakað at fara út til restina av Føroyum við, fyri ikki at siga út í heimin við, og styrkja seg uppaftur meira. Tað ræður bara um at fáa útbúnu norðoyingarnar heimaftur og onnur við. Og tað gera teir við vissu, um umstøðurnar eru nøktandi. Tí er umráðandi, at øll spæla við í hesum konseptinum og at man ikki letur religiøsa fundamentalismu og annað smásinnið stjórna leikinum frameftir.

Nú skuldi hendan røðan snúgva seg um Norðoyatunnilin. Haldi at verkætlanin hevur eitt nógv størri perspektiv, enn bara at vera eitt sambindingarlið millum Norðoyggjar og Eysturoy. Saman við Tangafirði kemur hon at kollvelta føroyska samfelagið rætta og menningarliga vegin, um rætt verður atborið. Og fyri at halda seg til tað meiri konkreta, so má tað vera eitt krav, at leirvíkingar fáa síni krøv ígjøgnum, um koyringina ígjøgnum bygdina, og at rundkoyring verður gjørd vestanfyri núverandi Leirvíkstunnil, hugsi um Gøtudal, soleiðis at hetta ikki verður størsta skaðaøkið í føroyskari ferðslu.

Tað tykist, sum eysturoyingar ikki hava brynjað seg á sama hátt sum klaksvíkingar til hesa nýggju eindina, sum dastið av Føroyum neyðturviliga verður, táið tað er samanbundið. Hugsi um tilboðini. Ein býur sum Runavík verður álaður sundur ímillum pólarnar, Klaksvíkina og Havnina, um tað ikki verður lagt á heilt annan bógv á fleiri økjum. Ein býur sum vaknar kl. 8 á morgni og sovnar kl. 5 seinrapartin yvirlivir ikki, og er á ongan hátt dubbaður til framtíðina. Og nú kódnaði seinasta og einasta skeinkiloyvið fyri kortum. Ferðavinnumaðurin Pætur Rasmussen snaraði lyklinum í hurðini á Casa Blanca og á vaktarskiftinum loysti bingodillan av. Brynjolfur, Tummas Petur og Christian Høgni gera nú eina nýggja roynd í gamla handlinum hjá Bjarna Blikk, vónandi fer tað at eyðnast teimum. Ræðsluscenarioið er kóvboybýurin, har hestarnir taka sjógv á bak, tú sært bara dustskýggini eftir teirra farvegi, táið teir fara ríðandi bæði í ein sunnan og í ein norðan. Men kanska hevur Rodmundur einhvørja ætlan í ermuni, sum ger býin til eina sterka miðás ímillum pólarnar báðar. Keypið av Klaksvíkar Timburhandli er neyvan dømi um, at maðurin hevur givið skarvin yvir. Í hvussu er eitt tekin um, at borgmeistarin í Runavík hevur álit á vøddunum og fyritakseminum hjá norðoyingum.

Skal bara ynskja norðoyingum góða eydnu við tunlinum og av hjarta vóna, at tit megna at umdefinera tykkum rætt til eina spildurnýggja støðu, sum kemur at krevja nakað av tykkum, men løgið skuldi tað verið, um tað seiggið og tann gigantiska uppdriftin, ið hevjaði tykkum úr øskuni, sum fuglurin Føniks, eftir djúpastu kreppu í landsins søgu, har allir partar tóku lógvatak saman fyri at bjarga økinum og býnum, ikki eisini hesaferð vinnur á øllum hóttafallum. Nýbyggjarakulturin er eyðsýndur, tit eiga tað sum tit hava skapað, og eru góð við tað, og væntað neyðturviligar funktiónir í lokalsamfelagnum, so fer man undir at hevja tær úr svørðinum við egnari megi, og tað er hetta góða átakið, Leikalindin, eitt tað besta dømi um.

> *Vit vanliga deyðiligu fata tað ikki fyrrenn jylluta gongulagið broytist, stamingin stadnar og útróðrarmenninir yviri á Stongunum eru farnir at roykja Prince, sum teir ið rekast niðan- og omaneftir Niels Finsensgøtu*

Sjálvt um Húshamar sigst hava sagt, at ongin fani sleppur livandi burturúr lívinum, líkamikið hvat sagt verður um lívið, eisini á gøtumøtum, so ræður um at brúka lívið Guð gav okkum so rætt sum møguligt, eisini á bráðpannuni har allir vøddar og allar heilakyknur virka í felag fyri einum betri samfelag. Og í Føroyum gerst tað bara, við at allir føroyingar virka saman, við tí eina endamáli, at tjóðin yvirlivur og mennist og gerst ein sjálvsagdur partur av heimssamfelagnum. Óneyðugt skuldi verið at sagt, at ein sjálvstøðugur føroyskur statur hevði verið høgligasta amboðið í hesum starvi. Men tað eru feðgarnir á Norðlýsinum valla samdir við mær um. Takk fyri at tit góvu mær høvið at hugleiða um framtíðina - við støði í Norðoyatunlinum.

Spennandi verður nú at síggja um klaksvíkingurin fer at lata seg standardisera. Nú ræður um, at fólkalívsfrøðingarnir eru á vakt. Vit vanliga deyðiligu fata tað ikki fyrrenn jylluta gongulagið broytist, stamingin stadnar og útróðrarmenninir yviri á Stongunum eru farnir at roykja Prince, sum teir ið rekast niðan- og omaneftir Niels Finsensgøtu – vindulin standandi á skák – uppeftir – ímillum fremstafingur og longutong. Ella táið hendan flata og sjarmerandi dialektin fer at missa broddin. Vónandi varðveita tit onkur av hesum eyðkennunum, í fyrstu atløgu kunna tey brúkast sum ferðavinnumál, soleiðis at ferðslan í skiftistíðini verður í minsta lagið ájøvn ella heldur dyggari - norðuryvir.